# Hava skift stíl á Tvøroyri

**Tryggingingarfelagið Føroyar á Tvøroyri er flutt í nýggj høli og tað ætla tey at viðskiftafólkini skulu merkja**

HÆKKAÐ TÆNASTUSTØÐI
*Áki Bertholdsen*



*Heilt fitt av fólki, bæði stór og smá, var samankomið í teimum nýggju, ljósu hølunum hjá Tryggingarfelagnum Føroyum á Tvøroyri, tá ið deildin har alment tók nýggja húsið í nýtslu fríggjadagin*

**Tvøroyri:** Nógv fólk varð komið saman seinnapartin fríggjadagin, tá ið Tryggingarfelagið Føroyar flutti í nýggj høli á Tvøroyri.

Tryggingarfelagið hevur keypt húsið, sum Bókbindarin hevði handil í beint við høvuðsvegin, mitt á Tvøroyri og nú nýggju hølini vórðu tikin í nýtslu var almenn móttøka seinnapartin fríggjadagin, har ymiskt var á skránni, bæði fyri stór og smá.

– Endamálið at flyta í nýggj høli er at hækka tænastustøðið, segði tryggingarstjórin, Gunnar í Liða, í eini stuttari røðu, hann helt á móttøkuni.

Hann segði, at Tryggingin royndi at nøkta tann tørv, tey sóu rundanum seg, men øll hugskot um, hvussu tænastan kann verða betri, eru vælkomin.

Hann segði, at tað var í 1989, at Tryggingin læt upp skrivstovu á Tvøroyri og nú vóru tey so flutt í nýggj høli.



*Bergur Stórhamar, v.m. var fegin um kekkin, hann fekk frá tryggingarstjóranum, Gunnari í Liða.Gávan kemur sera væl við og kemur onkusvegna øllum til góðar, tí bjargingargelagið er altíð til reiðar, tá ið tað óvæntaða hendur*

Anna Larsen, sum er dagligur leiðari á deildini á Tvøroyri, segði, at tryggingin hevði ikki bara skift høli, hon hevði eisini skift stíl. Nú er ikki longur ein stórur diskur, sum fólk skulu til og so stendur tryggingarfólkið aftanfyri.

Diskurin er minkaður niður í onki fyri at fólk skulu koma í tættari samband við starvsfólkið og fyri at geva viðskifta-fólkunum eina kenslu av at koma heilt inn á arbeiðsplássið.

Tryggingin hevur nú eisini fingið felags umstilling. Tað merkir, at tá ið ringt verður á Tryggingina á Tvøroyri, er tað høvuðsdeildin í Havn og sum síðani stillar um.

### Fekk 10.000 krónur

Tryggingin brúkti eisini hetta høvi til at lata eina gávu til vælgerðandi endamál í Suðuroynni. Felagið hevði gjørt av at lata Bjargingarfelagnum í Suðuroyar Norðaru Helvt eina peningávu upp á 10.000 krónur.

– Felagið hevur ongar inntøkur, so ein gáva sum hendan kemur sera væl við, segði Bergur Stórhamar

úr Bjargingarfelagnum, tá ið hann tók ímóti gávuni.

Hann vísti eisini á, at felagið hevur vánalig høli og skrivaraborðið er ein kassi, so tað kom somuleiðis væl við, at felagið eisini fekk innbúgvið úr hølunum, sum Tryggingarfelagið flutti úr, nú tað tekur hesi nýggju hølini í nýtslu.

Hann fortaldi, at Bjargingarfelagið í Suðuroyar Norðaru helvt varð stovnað í 1979 og nú eru 100 limir í felagnum.

– Hetta eru alt fólk, sum gera eitt sjálvboðið arbeiði, tá ið tað óvæntaða hendur og brúk er fyri eini hjálpandi hond, tí tá eru teir til reiðar og sostatt koma gávurnar frá Tryggingarfelagnum onkusvegna øllum til góðar.

# Frítíðarskúlin í Vági staðfestur í Býráðnum

FRÍTÍÐARSKÚLI
*Áki Bertholdsen*

**Vágur:** Vágs Býráð hevur nú endaliga staðfest, at frítíðarskúli skal vera í kommununi.

Frítíðarskúlin er so smátt byrjaður, men á býráðsfundi mikukvøldið samtykti býráðið einmælt at staðfesta skúlan og at játta 190.000 krónur til frítíðarskúlan tað, ið eftir er av árinum.

Annars verður mett, at frítíðarskúlin fer at kosta kommununi 400.000 - 500.000 krónur um árið. Fíggjarætlanin fyri næsta ár er ikki løgd enn, so tað ber ikki til at áseta nágreiniligu upphæddina.

Frítíðarskúlin í Vági heldur til í hølum í Vágs Skúla og hann er fyri børn í fyrsta, øðrum og triðja flokki, men enn eru bara børn í fyrsta og øðrum flokki byrjað.

Frítíðarskúlin letur upp stutt fyri døgverða hvønn dag og letur aftur klokkan gott fimm seinnapartin.

Ætlanin við frítíðarskúlanum í Vági er, sum aðrastaðni, at børn í fyrsta, øðrum og triðja flokki skulu hava onkustaðni at vera undir tryggum og skipaðum viðurskiftum, frá tí at tey sleppa úr skúlanum, til foreldrini koma heim úr arbeiði.

Men tað eru ikki øll børn, sum fara at ganga í frítíðarskúla. Talan er um eitt tilboð til foreldrini, tí tað er ikki heilt ókeypis fyri foreldrini, sum melda børn síni til frítíðarskúlan.

Tað kostar foreldrum 850 krónur um mánaðin at hava eitt barn í frítíðarskúlanum, tað er 30% av kostnaðinum.

Jógvan Krosslá, borgarstjóri í Vági, sigur, at dagligur leiðari er settur í 3/4 tíð, tað er Unn Mikkelsen. Eitt hjálparfólk er eisini sett, tað er Yvonna Toftum.



*Í Vàgi kunnu foreldur at børnum í fyrsta og øðrum flokki nú senda børnini í frítíðarskúla eftir vanliga skúlatíð. Men skjótt fáa foreldur at børnum í triðja flokki eisini hendan møguleikan*

Í løtuni eru bara eini 10-11 børn í frítíðarskúlanum. Men í fyrstu syftu verður pláss er fyri 20 børnum, so fæst at síggja, hvør tørvurin verður.

Hóast skúlin enn ikki er meiri enn hálvsettur, ivast borgarstjórin ikki í, at fleiri børn verða meldað til skúlan, tá ið eitt tíð er fráliðin og foreldur hava vant seg við, at hetta er eitt tilboð í kommununi.

– Hetta er eitt tilboð, vit eiga at hava. Tíðin krevur tað, tí tað kann vera ótrygt hjá foreldrum at smáum børnum ikki at vita, hvar børnini eru, tá ið tey eru sloppin úr skúlanum og tað eru ikki øll bøærn, sum hava onkustaðni at fara eftir skúlatíð, uttan at fara heim í eini tóm hús.



# Bill hevur valt fólk sum hann hevur álit á



*Bill Justinussen heldur, at tað er lættari hjá sær at velja fólk í siðseminevndina, sum hann kennir og hevur álit á, heldur enn fólk, hann ikki kennir*

**Bill Justinussen, sigur, at hann hevur valt nýggjar limir í siðseminevndina, sum avspegla hansara hugsjónir**

VÍSINDALIGA SIÐSEMINEVNDIN
*Áki Bertholdsen*

– Eg havi valt fólk, eg havi álit á.

So stutt og greitt grundgevur Bill Justinussen, Landsstýrismaður í heilsumálum, fyri, hví hann nú hevur gjørt av at skifta meginpartin av vísindaligu siðseminevndini út.

Vísindaliga siðseminevndin skal veljast eftir hvørt løgtingsval og nú hevur eisini nýggi landsstýrismaðurin valt nevndina av nýggjum.

Men tað hevur vakt ans, at fleiri av nevndarlimunum eru kend frá átrúnaðarligum samkomum av ymsum slagi – og ikki altíð fyri tey mest hóvligu sjónarmiðjuni.

Men tað heldur Bill Justinussen ikki vera skeivt.

– Eg haldi, at tað hevur týdning at nevndir og ráð verða skift út av og á. Og tað skuldi ikki verið til nakran bága fyri samanhangin í nevndararbeiðnum, at fleiri nýggir limir nú eru í nevndini, tí allir tríggir læknarnir í henni eru teir somu.

Bill Justinussen heldur, at ein orsøk til at hann heldur tað vera sunt at skifta nevndarlimir út, er, at hann heldur tað alsamt hava týdning at fáa nýggj sjónarmið við í kjakið um siðsemiligar spurningar.

### Hevur valt fólk hann kennir

Hann sigur eisini, at siðseminevndin er fyrst og fremst ein nevnd, sum skal ráðgeva landsstýrismanninum og tí hevur hann valt nevndarlimir, sum hann hevur álit á.

– Tað er lættari hjá mær at velja fólk ið nevndina, sum eg kenni, heldur enn fólk, eg onki veit um.

Hann sigur, at tá ið hann velur siðseminevndina, fær hann ikki nakað fakligt tilmæli frá umsitingini til, hvørjir nevndarlimirnir skulu vera, uttan tá ið talan er um teir tríggjar limirnar, sum Læknafelagið innstillar.

– Sostatt ger landsstýrismaðurin einsamallur av, hvønn hann velur í nevndina og hann heldur at hann hevur valt eina nevnd, sum fakliga er væl skikkað.

Hann vísir á, at Anne-Lene Olofson í Klaksvík, er guðfrøðingur. Eydna Háberg er sjúkrasystir og hevur royndir í almennu fyrisitingini frá teirri tíðini, hon var leiðari á heimarøktini.

– Dánjal á Dul Jacobsen, er samkomuleiðari í Evangeliuhúsinum og eg havi álit á, at hann kann bera sjónarmið fram, sum hava undirtøku í stórum parti av fólkinum.

– Eitt nú hevur hann havt rættiliga áhugaverdar sendingar í útvarsstøðini Lindini, har hann hevur viðgjørt heimsspekiligar og siðsemiligar spurningar og tí meti eg hann vera rættiliga væl skikkaðan at kjakast um siðsemiligar spurningar.

Seinasti nevndarlimurin er Jens Vang, sum er løgfrøðingur.

Bill Justinussen spyr eisini, hvat vit skulu hava ein landsstýrismann til, kunnu teir ikki sleppa at taka nakrar avgerðir.

– Skal umsitingin taka allar avgerðirnar, er ongin orsøk til at hava landsstýrismann yvirhøvur, sigur Bill Justinussen.

Hann sigur, at hetta er fyri at fáa tann politiska vinkulin við í málinum og hann dylir heldur ikki fyri, at hann hevur hugsað um at velja nevndarlimir, sum draga somu línu sum hann í slíkum málum.

– Høvdu vit ein landsstýrismann, sum hevði ógvuliga frælslyntar hugsjónir, hevði hann óivað eisini manna nevndina við fólkum, sum stuðlaðu hansara sjónarmiðjum, heldur Bill Justinussen.

# Meirilutin av siðseminevndini er nú skiftur út

**Fýra av sjey nevndarlimum eru nývaldir í vísindaligu siðseminevndini**

SIÐSEMINEVND
*Áki Bertholdsen*

BillJustinussen, landsstýrismaður í heilsumálum, hevur nú valt nýggja vísindaliga siðseminevnd, sum skal virka í hesum valskeiðnum.

Og ikki slepst undan, at hann skar djúpt, nú hann valdi nevnmdina av nýggum.

Siðseminevndin skal veljast eftir hvørt løgtingsval og nú hevur landsstýrismaðurin gjørt av, hvør skal manna nýggju nevndina.

Tað eru sjey limir í nevndini. Tríggir skulu veljast eftir tilmæli frá Læknafelag Føroya, men hinar fýra limirnar velur landsstýrismaðurin sjálvur.

Teir tríggir nevndarlimirnir, sum Læknafelagið valdi í nevndina, eru Høgni Djurhuus, Annika Olsen og Eliesar Olsen, sum øll eru læknar.

Hesi trý sótu eisini í gomlu nevndini, sum nú fer frá.

Men Landsstýrismaðurin brúkti fult út hetta høvi, sum hann fekk at velja fýra limir í nevndina, tí hann setti fýra heilt nýggj fólk í nevndina.

Hinir fýra nevndarlimirnir eru:

Anne-Lene Olofson, lektari úr Klaksvík,

Eydna Háberg, sjúkrasystir úr Havn,

Dánjal á Dul Jacobsen, fyristøðumaður úr Havn

Jens Vang, løgfrøðingur úr Havn.

Varalimirnir eru Marius Rasmussen, yvirlækni, sum Læknafelag Føroya hevur valt og sum eisini er afturvaldur. Hinir báðir nevndarlimirnir eru Sverri Steinhólm, prestur og Richardt Schwartson, apotekari, sum báðir eru nývaldir.

Sostatt eru allir limirnir nývaldir í nevndina, uttan teir tríggir, sum Læknafelagið hevur valt.

Umframt teir tríggjar limirnar hjá Læknafelagnum, sótu hesi fýra í nevndini:

Sonja Klein, prestur,

Jalgrim Hilduberg, løgfrøðingur,

Dorete Bloch - fil.dr.,

Richardt Schwartson, farmaseutur

Og varalimirnir vóru Marius Rasmussen, yvirlækni, sum Læknafelag Føroya valdi, umframt Uni Næs, prestur og Bergtóra Hanusardóttir, sertannlækni.

# Hevur ikki skipað seg enn

**Nývalda siðseminevdnin fer at skipa seg so skjótt, høvi býðst**

VÍSINDALIGA SIÐSEMINEVNDIN
*Áki Bertholdsen*

Nývalda siðseminevndin hevur ikki skipað seg enn.

Høgni Djurhuus, sum er formaður í fráfarandi nevndini, sigur, at tað er ikki heit greitt, hvør skal kalla inn til fyrsta fundin, har nevndin skal skipa seg, um tað er formaðurin í fráfarandi nevndini, ella um um tað er landsstýrismaðurin sjálvur.

Hann segði, at hann var í ferð við at kanna málið og tá ið tað var avgreitt, verður nevndin kallað saman so skjótt sum gjørligt.